# Eitt lívsvandamikið arbeiði

**Á einum fundi í altjóða hvalaveiðinevndini í áttatiárunum, reistist ein leiðari fyri ein umhvørvisverndarfelagsskap og segði: »Alan, tú ert ein deyður maður. Eg skal drepa teg…«**

MENNISKJU OG NÁTTÚRA
*Vilmund Jacobsen*

Amerikumaðurin, Alan Macnow, er PR-maðurin hjá Japan í USA fyri hvalaveiði.

Tað er eitt lívsvandamikið arbeiði…

Í samrøðu við IntraFish sigur Alan, at hann fær fleiri hóttanir móti lívi og heilsu síni í hesum starvi.

Á einum fundi í altjóða hvalaveiðinevndini í áttatiárunum, reistist ein leiðari fyri ein umhvørvisverndarfelagsskap og segði: »Alan, tú ert ein deyður maður. Eg skal drepa teg…«

Alan fær eisini brøv og uppringingar við slíkum hóttanum.

– Av og á noyðist eg at knýta nevarnar til tess at verja meg móti slíkum fólkum, sigur hann.

Telduskipanin hjá honum í felagnum, Tele-Press Associates Inc, hevur eisini verið álopin av figgindasinnaðum »hackarum«.

Alan hevur umboðað fiskivinnuáhugamál hjá Japan í USA síðan 1977, og hann hevur eisini umboðað japanskar hvalaveiðimenn í USA síðan 1979.

– Okkara figgjarætlan til PR-arbeiði í USA er ikki stór í mun til peningin, sum brúktur verður av umhvørvisverndarfelagsskapum ímóti hvalaveiði í USA.

Umboðsmaðurin vísir á, at umhvørvisverndarfelagsskapir brúka fleiri miljónir dollarar um árið í stríðnum ímóti hvalaveiði, meðan upphæddin, sum hann hevur til nýtslu í USA, er ein hálv miljón dollarar.

– Eg haldi, at tað eru nógvir aðrir týdningarmiklir trupulleikar, sum skuldu verið loystir við stuðli heldur enn at brúka so nógvan pening til stríðið móti hvalaveiði.

Alan heldur, at peningurin, sum umhvørvisverndarfelagsskapirnir fáa, hevði farið betur, um hann fór til stríðið móti svongd, fátækradømi og sjúku.

Hann sigur, at umhvørvisfelagsskapirnir byrjaðu stríðið móti hvalaveiði longu í 1965.

– Tey hava gjørt hvalin til eitt religiøst »ikon« og hava latið tilfar í rúgvuvís floyma inn yvir barnagarðar, skúlar og hægri lærustovnar. Á henda hátt hava tey nærmast gjørt hvalin til ein menniskjaligan skapning. Hvalurin verður settur fram sum ein vinarligur, skilagóður og blóðheitur skapningur sum vit menniskju – og við einum sosialum familjulívi eins og vit menniskju, sigur Alan.

Men einki av hesum er rætt, sigur hann. Hvalurin er ikki eitt serliga vinarligt djór. Nøkur hvalasløg hava »harem«, sum ikki kann samanberast við vanligt familjulív hjá menniskjum.

– Hvalurin líkist eini agurk, sum vigar 20 tons, sigur Alan, sum spyr, hví umhvørvisverndarfelagsskapir soleiðis seta kikaran á hvalin.

Og Alan Macnow velir at svara sjálvur:

– Tað er tí, at hvalurin er heimsins størsta súgdjór, og tað er hetta, sum ger hann til nakað serligt fram um onnur djór í havinum.



*– Hvalurin er ikki eitt serliga vinarligt djór. Nøkur hvalasløg hava »harem«, sum ikki kann samanberast við vanligt familjulív hjá menniskjum, sigur Alan Macnow, sum er japanskur PR-maður í USA*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# Mariann og Birita vitjaðu í Saltangará

**– Tá ið vit eru lidnar við 10. flokk, fara vit at arbeiða í eitt hálvt ár. Síðan fara vit til Danmarkar á háskúla og seinni á studentaskúla í Vági**

STARVSVENJING
*Vilmund Jacobsen*

Týsdagin hevði redaktiónin í Saltangará vitjan av Hera á Rógvi, sum starvast á Sosialinum og tveimum skúlanæmingum, sum eru í starvsvenjing á Sosialinum.

Næmingarnir, sum eru úr 10. flokki í Tvøroyrar skúla, eru Mariann Mortensen og Birita í Dali, báðar 16 ára gamlar.

Heri kom framvið í arbeiðsørindum og hevði starvsnæmingarnar við sær.

Í Tvøroyrar skúla eru tveir 10. flokkar, har umleið 20 næmingar eru í hvørjum flokki. Flokslærari hjá Mariann og Biritu er Jean Dimon. Flokslærarin hjá hinum flokkinum er Turið Vestergaard, sum er mamma Biritu.

## Á háskúla

Hetta er onnur vikan hjá Mariann og Biritu á Sosialinum. Seinast, tær vóru í starvsvenjing, var Mariann á Royndarstøðini í Kollafirði, og Birita var í Útvarpi Føroya.

Tá ið tær koma suðuraftur til Tvøroyrar, verður vanlig skúlagongd ta fyrstu vikuna; síðan verður jólaroynd.

Eftir loknan 10. flokk, ætla tær at arbeiða í eitt hálvt ár og síðan fara á háskúla í Danmark í 4 ella 6 mánaðir, frá januar 2004 til summarfrítíðina.

Afturkomnar úr Danmark fara tær báðar ætlandi á studentaskúla í Vági.

Báðar siga seg dáma sera væl á Sosialinum. Tær hava skrivað triggjar blaðgreinar saman – og tann fjórða er á veg…

Sosialurin ynskir Mariann og Biritu góðan byr.



*Starvsnæmingarnir Birita og Mariann, í hølunum hjá Sosialinum í Saltangará.*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# Eingin landing á Havsbrún



*Danski báturin, Gitte Henning, hevur landað nakrar ferðir í Fuglafirði í ár*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*

Hvørt hevur sína vertíð, og kvotur seta sínar avmarkingar…

Á Havsbrún í Fuglafirði hevur eingin landing verið seinastu dagarnar, og á virkinum vænta tey ikki tann nógva aktivitetin tað, ið eftir er av hesum árinum.

Tey nógvu tonsini, sum fara um maskinurnar á virkinum gjøgnum árið, krevja tó ymiskt viðlíkahald, sum ikki er møguligt í vertíðini. Slíkt verður tí gjørt, meðan lítil og eingin fiskur kemur uppá land.

Á virkinum eru tey eisini í holt við at seta upp eina nýggja turku, eins og aðrar broytingar og umvælingar verða gjørdar í hesum døgum.



# Søkja av nýggjum eftir aðalstjóra

**Hóast fimm umsøknir komu til starvið sum aðalstjóri í Almannaráðnum er starvið nú lýst leyst av nýggjum. Starvið verður tí neyvan mannað fyrr enn næsta ár**

STARVSSETAN
*Jón Brian Hvidtfeldt*

Um dagarnar verður lýst eftir aðalstjóra til Almannaráðið. Freistin at søkja starvið var upprunaliga úti fyri góðum mánað síðan, og tá komu fimm umsøknir til starvið. Kortini verður nú søkt av nýggjum eftir aðalstjóra.

- Vit mettu, at vit vildu hava fleiri skikkaðar umsøkjarar at velja ímillum, tí valdu vit at søkja av nýggjum, sigur Marjun Hanusardóttir, løgmansstjóri.

Spurd, hvat er eitt hóskandi úrval av skikkaðum umsøkjarum at velja ímillum sigur Marjun Hanusardóttir, at sjálvandi er altíð ynskiligt at fáa so nógvar skikkaðar umsøkjarar sum gjørligt.

## Ovasti ráðgevi hjá landsstýrismanninum

Tann, ið fær starvið sum aðalstjóri í Almannaráðnum, kemur at vera ovasti ráðgevi hjá landsstýrismanninum í almannamálum, og hevur harumframt ábyrgdina av dagligu leiðsluni, menningini og rakstrinum av nýggja Almannaráðnum, ið er annað av ráðunum undir Trivnaðarmálaráðnum.

Dentur verður lagdur á, at umsøkjarar skulu hava hægri útbúgving og leiðsluroyndir frá almenna ella privata arbeiðsmarknaðinum, ella skulu tey hava royndir, ið kunnu javnsetast við hetta. Umsøkjarar skulu hava innlit í politisk viðurskifti, og vitan um tær treytir, ið eru galdandi í eini politiskari fyristing, og eisini verður dentur lagdur á persónligar eginleikar, og góð samstarvsevni.

Aðalstjórarnir í ymsu ráðunum verða allir løntir í 39.lønarflokki í sáttmálanum fyri tænastumenn. Við føstum viðbótum er lønin hjá aðalstjóranum góðar 42.000 krónur um mánaðin, umframt eina viðbót uppá 4.000 krónur um mánaðin fyri at vera aðalstjóri.

Freistin at søkja starvið er sett til 18.desember. Marjun Hanusardóttir, løgmansstjóri, sigur, at nú tey hava valt at søkja av nýggjum, verður starvið neyvan sett fyrr enn í fyrsta lagi eftir nýggjár. Eisini má roknast við, at umsøkjarar møguliga hava uppsagnartíð í sínum gamla starvi, so tað kann draga nakað út, áðrenn starvið sum aðalstjóri í Almannaráðnum verður mannað. Løgmansstjórin sigur tó, at tey fara at leggja seg eftir at fáa starvið sett skjótast gjørligt.



*Hóast fimm umsøknir komu til starvið, verður nú søkt av nýggjum eftir aðalstjóra til Almannamálaráðið hjá Páll á Reynatúgvu, landsstýrismanni.*

# Ein seinnapartur við bókum og høvundum

**Árligi Bókadagurin verður í Norðurlandahúsinum komandi sunnudag**

BÓKADAGUR 2002
*Tíðindaskriv*

Árligi bókadagurin verður nú sunnudagin tann 1. desember í Norðurlandahúsinum millum klokkan 15.00 og 18.00 seinnapartin. Eins og í fjør verður talan um bókakafé við framsýning av bókunum, ið eru komnar út á føroyskum í ár.

Tiltakið er eitt slag av bókamessu, har fólk kunnu koma og fara sum tey hava hug, síggja bókurnar , tosa við høvundar og útgevarar og keypa sær ein drekkamunn, meðan tey lurta eftir upplestri ella samrøðu við onkran rithøvund, sum hevur latið nýtt verk úr hondum.

Føroyskar barna- og ungdómsbøkur mennast, og Brynhild Andreasen og Sólrún Michelsen fara at lesa og siga frá um sínar bøkur. Sigsøguligar bøkur hava altíð stóran áhuga, og Ingrið Sondum fer at hava samrøðu við systkini Elina og Axel Mortensen um tíðina, tá tey vuksu upp suðuri á Tvøroyri.

Fleiri yrkingasøvn eru komin í ár. Niels Uni Dam og Steinbjørn B. Jacobsen fara at lesa úr sínum nýkomnu søvnum. Og so er tað Jóanes Nielsen. Hvussu er vorðið við honum? Er hann skaldsliga fluttur á hvíldarheim ella hvat? Tað fer Vár í Ólavstovu at spyrja um í samrøðu við Jóanes.

Tað er Rithøvundafelagið, sum saman við Norðurlandahúsinum skipar fyri bókadegnum, og felagið fer at vísa fram nýggju heimasíðuna www.rit.fo, har tað ber til hjá áhugaðum burturi og heima at finna tilfar um føroyskar rithøvundar. Heimasíðan byggir á Rithøvundabókina, sum kom út í 1995, har teir umleið 100 limirnir í felagnum skrivaðu um seg sjálvar og síni verk. Teir almennu partarnir um føroyskar bókmentir eru umframt á føroyskum eisini á enskum máli.

Bókasølan stendur fyri framsýninginum av ársins bókum.

Tað er ókeypis at koma inn og verða við í bókadegnum.

*Sunnudagurin komandi er ársins Bókadagur við nógvum bókum og rithøvundum í Norðurlandahúsinum*




## Skráin fyri Bókadagin er henda:

**Bókadagur við bókakafé verður sunnudagin 1. desember kl. 15 - 18 í Norðurlandahúsinum.**

| | |
|---|---|
| Kl. 15.00: | Bókaframsýningin letur upp |
| kl. 15.15: | Rithøvundafelagið bjóðar vælkomin. Nýggja heimasíðan hjá felagnum verður tikin í nýtslu |
| kl. 15.30: | "Kuffi". Brynhild Andreasen lesur úr barnabókini, sum var í uppskoti til norðurlendska virðisløn |
| kl. 15.45: | "Geislasteinar". Sólrun Michelsen lesur og sigur frá um ævintýrabók sína |
| kl. 16.00: | Úr farnum tíðum. Ingrid Sondum hevur samrøðu við systkini Elina og Axel Mortensen. |
| kl. 16.30: | Steðgur, har høvi verður at tosa við høvundar og útgevarar |
| kl. 17.00: | "Rótleys tøgn". Niels Uni Dam lesur nýggjar yrkingar |
| kl. 17.20 : | Er Jóanes Nielsen fluttur á hvíldarheim? Upplestur og samrøða, sum Vár í Ólavstovu hevur við skaldið |
| kl. 17.45: | "Karr". Steinbjørn B. Jacobsen lesur úr nýggja savninum |
| kl. 18.00: | Bókadagurin endar |